## Vox Pop í Mentanarhúsinum



**Heðin, 27 ár úr Havn**
Mær dámdi væl konsertina. Makrel vóru feitir. Gåte var feitt, fantastiskt og læruríkt. Tað er sum at hava gingið við Hestaklappum og so fáa teir tiknar burtur. Hatta var ein gjøgnumførd upptraðkan. Beint í gronina. Tú mást dáma tað ella ikki. Ofta eru konsertir hampiligar, fólk vilja heldur vera hampulig enn ring. Vilja ikki fornerma. Men man vil nógv heldur vera fornermaður enn líkaglaður.



**Carla, 19 ár úr Gøtu**
Eg helt konsertina vera ordiliga góða. Serliga Makrel og Gåte. Seinasta lagið hjá Knút var ordiliga gott. Lama Sea er altíð gott.



**Durita, 18 ár úr Havn**
Mær dámdi ordiliga væl. Gåte var best og Knút var næstbest. Síðstu tveir minuttirnir hjá Knút vóru heilt ótrúliga góðir. Eitt ótrúliga gott kvøld.

# Á dett lív!

**Mentanarhúsið í Fuglafirði livdi enn einaferð upp til heitið sum besta konsertstað í Føroyum. Frálíkir føroyingar og garrvillir norðmenn skiftust um at bergtaka og tónlistarliga rúsa**



UMMÆLI
*Niels Uni Dam*

Gåte vitjaðu Føroyar á seinasta G-Festivali. Tey borðreiddu har við eini av betru framførslunum á einum annars framúr festivali. So vónirnar vóru rættuliga stórar áðrenn konsertina. Eisini hini nøvnini vóru spennandi á pappírinum. Lama Sea og Makrel, sum hava verið millum jaligastu upplivingarnar í Prix Føroyar kappingini og so Knút Háberg Eysturstein. Eg hevði ongantíð hoyrt Knút solo, so tað var ikki minnið spennandi.

Áðrenn konsertin byrjaði, legði DJ Switch tónleik á.

### Glaður poppur

Men endiliga byrjaði Knút Háberg Eysturstein, og hann var framúrskarandi. Havi sæð hann í Marigold, Marys Baby og í Gestum, uttan at hann veruliga hevur víst sína gávur.

Hann er ein føddur frontfigurur. Hevur eina góða rødd, eina Roy Orbisonsliga útstráling og øðiligar gávur at skriva penan og glaðan popp við einum serføroyskum eygnabráði. Tankarnir fóru beint til Martin Joensen. Hetta tó uttan, at løgini mistu sítt Knútleika.

Enn vóru ikki so nógv komin á konsert, men tey sum vóru har livdu væl við í framførsluni. Knút og bólkurin hjá honum spældu løg av fyrstu fløguni hjá honum, og okkurt nýtt. Framførslan av lagnum »Í hesi nátt« var ordiliga góð. Nýggja lagið »Spark«, var øðiliga stórsligið og besta av nýggju løgunum. Meðan stilla lagið »Slip away« ikki heilt var líka fangandi sum restin av tilfarinum. Ein kontritolking av lagnum »Shine« av fløguni, var eisini eitt hæddarpunkt.

Seinasta lagið »Roads«, var ein blandað uppliving, fyrsta løtan var øðiliga einkisigandi, til endin byrjaði. Spakuliga vaks larmurin av ljóðførunum til Óljóði at enda, var sum ein veggur av ljóði. Ein kraftmikil endi á einari glaðari framførslu.

DJ-Switch skrúvaði aftur diskotekstónleikin hart frá, og salurin tømdist skjótt. Tey yngstu vóru verandi inni, og nøkur av teimum dansaðu.

### Blaðungar gentur

Makrel vóru næstir á pallin, og salurin fyltist skjótt aftur. Makrel eru vorðnir eitt stórt navn í Føroyum. Flokkurin av blaðungum gentum framman fyri pallin vísir, at áskoðarafjøldin er broytt. Frá at vera stuttligir rokkarar, eru Makrel farnir egnar vegir. Tónleikurin er eitt slag av ótrúliga sterkum og vøkrum rokktónleiki.

Gittarleikarin Rasmus Rasmussen er so ótrúliga gávuríkur. Man ivast onga løtu í, hvussu stóran týdning hann hevur fyri bólkin. Men allir hinir hava eisini ment seg, og mest av øllum hava teir ment seg sum bólkur. Framførslan av instrumentala lagnum »Press Escape« av »Makrel stinkar«, vísti, hvussu nógv bólkurin hevur ment seg. Hóast eg eigi »Makrel stinkar«, og havi hoyrt lagið fleiri ferð, hevur tað ikki sagt mær nakað serligt. Men spælt av nýggja Makrel, var tað framúrskarandi.

Devilska lagið Beelsebub av Wonderland fløguni ljóðaði meira devilskt enn nakrantíð fyrr, og vakurleikin í Euphoria gjørdist enn vakrari sammett við devilskapin sum var. Eisini var framførslan av lagnum Wonderland framúr.

Leygarkvøldið gjørdust Makrel fyrstu ferð nummar eitt á 15 teimum bestu við lagnum Forever and Beyond. Hetta man vera besta lag, sum teir hava gjørt. Tí gjørdist lagið ein sera passandi endi á eini framførslu, sum rørdi og bergtók. Makrel høvdu allan salin við sær.

DJ-Switch megnaði skjótt at tøma salin, og mest tey sera fullu og tey yngstu vóru verandi inni. Heldur ikki nú dansaðu serliga nógv. Men hetta broytti ikki lagavalið hjá unga plátuvendaranum.

### Hoppiball

Gåte var næsti bólkur á pallin, og meðan ljóðið av introiðini hjá Gåte brakaði fyltist salurin. Fólk trokaðu seg fram ímóti pallinum. Frá fyrstu tónunum Gåte spældi, var salurin á gosið. Sjáldan hava so nógv fólk hoppað so leingi í Fuglafirði. Tann sum hoppaði mest, var tó gittarleikarin í Gåte. Eg havi ongantíð sæð eitt fólk leikað so illa í, og hann spældi frálíkt á gittar meðan hann gjørdi tað.

Trummur, bassur, violin, gittar og ein ótrúlig sangrødd. Onkuntíð spælir violinleikarin keyboard, og onkuntíð syngur bassleikarin eitt sindur. Men samanumtikið er konseptið hjá Gåte líkt tí hjá Týr. Løg við íblástri úr gomlum vísum, spæld av einum rokkbólki, ikki so nógv roks. Sangrøddin hjá Gunnhild er ein av størstu styrkjunum hjá bólkinum. Hetta vita tey væl av, og byggja tí løgini upp kring hennara rødd. Hetta hevði tíanverri við sær, at fyrstu nógvu løgini tykstust heldur einstáttað fyri hendan ummælaran. Tá hugsað verður um, hvussu væl Clickhaze dugdu at gera løg við íblástri úr vísum og kvæðum spennandi og fjølbroytt, so høvdu Gåte nógv at læra.

Men sum rokkkonsert var einki at klaga um. Áskoðararnir kókaðu, sum eg ongantíð havi upplivað fyrr. Miðskeiðis í konsertini fór sangarinnan av pallinum í tvey løg. Violin gjørdist høvuðsljóðføri. Gåte spældi rokkandi spælimannstónleik, sum hevði fingið Kristian Blak til at trampað í gólvið. Nú kom vend í konsertina. Løgini gjørdust betur og eitt sindur meira fjølbroytt. Eg var tó ikki rivin líka nógv við av hesari framførsluni sum av Makrel.

Gåte spældu fleiri eykaløg, og takkaðu fyri eina fantastiska uppliving.

### Lama Sea settu punktum

DJ Switch tømdi síðan aftur salin, og tíanverri fyri seinasta bólkin Lama Sea, valdi meirilutin ikki at koma inn aftur. Lama Sea settu punktum á kvøldið. Teir spældu sín deiliga glaða modernaða rokktónleik. Eg haldi, at tann spæligleðin, sum bólkurin hevur, smittar illa. Hóast flestu áskoðararnir vóru móðir aftan á eitt langt rokkkvøld, fingu Lama Sea smílini fram á varrunum.

Teir eyðkendu klædningarnir vóru hongdir í skápið. Tað var rættuliga keðiligt, tí konseptið manglaði okkurt. Tað tyktis ikki líka gjøgnumført. Vónandi verða klædningarnir funnir framaftur til næstu konsert.

Tá Lama Sea vóru lidnir, tók DJ Switch aftur yvir. Nú gekk betur, nógv dansaðu og tey sum vóru eftir tyktust at hugna sær.

Eg fór til Havnar.